## Natúrgass til Focus



Týska Ford bilverksmiðjan hevur latið 120 Ford Focus bilar til mynduleikarnar í Berlin, ið royna at fáa fólk at brúka natúrgass ístaðin fyri bensin. Bilarnir koyra eisini uppá bensin. Í Svøríki koyra Focus eisini uppá ethanol

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mini í USA



Amerikanarar hava víst stóran áhuga í Mini Cooper. BMW hava ætlanir um at framleiða 100 tús. bilar á verksmiðjuni í Onglandi, men tað sær út til at verða alt ov lítið

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mazda yvirskot



Eftir nøkur trupul fíggjarlig ár, varð yvirskotið hjá Mazda fyritøkuni í Hiroshima 10,2 milliardir krónur seinasta roknskaparár. Umframt Mazda 6, ið kemur á marknaðin í heyst, eru fleiri nýggjheitir á veg.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Nissan X-Trail – sameinir off-road og góðar koyrieginleikar




*Nissan X-Trail kemur ivaleyst at klára seg væl í kappingini millum lívsstíls og frítíðarbilar*



*Instrumentini eru í miðjuni og eitt handskarrúm er frammanfyri bilføraran*

**X-Trail er tann fyrsti sokallaði lívsstíls off-roadarin hjá Nissan. X-Trail skal kappast við bilar sum Toyota RAV4 og Land Rover Freelander, ið sameina off-road eginleikarnar við góðar koyrieginleikar á longri túrum og til býkoyring**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nútímans off-roadarar eru ofta ein sameining av jeepum og persónbilum, t.v.s. at bilarnir eru lættir at koyra við í býnum, men klára seg eisini væl uttanfyri koyrivegin. Nissan X-trail er ein elgantur 5 persónabilur, ið kann trekkja á 2 ella 4 hjólum, ella við "Autofunktión", sum elektroniskt deilir kraftina millum fram og bakhjólini. Bilurin fæst við 2.0 litur bensinmotori ella 2.2 litur dieselmotori við nýggjastu common-rail innspræningarskipanini. Í bensinútgávuni fæst hann við 5 trins manuellum girkassa ella automatiskum girum, meðan dieselútgávan hevur manuellan 6 trins girkassa. Instrumentborðið er av nýggja slagnum við instrumentunum í miðjuni, eins og á nýggja Nissan Primera.

### Nissan X-Trail 2.2 CDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.2 litur 4 syl. turbodiesel 114 hk v. intercoolara og common-rail innspræning |
| 0-100 km/t | 13,7 sek. |
| Oljunýtsla | 13,9 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 215/65-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 451,0 cm |
| Breidd | 176,5 cm |
| Hædd | 166,5 cm |
| Eginvekt | 1500 kg |
| Totalvekt | 2050 kg |
| Prísur | við dieselmotori úr kr. 329.000,- (sum vøruvognur kr. 249.000,-) |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge v. Oyggjarvegin FO-110 Tórshavn Tel. 345400 www.nissan.fo |

# VW Transporter – dekoreraður av Goodyear

**Hósdagin í síðstu viku lat Bilasølan hjá Øssur Johannesen ein nýggjan VW Transporter, ið var dekoreraður í Danmark, í samráð við Goodyear Danmark, til Super Dekk í Havn**




*Øssur Johannesen, VW umboðsmaður, handar her Goodyear Transportaran til Fríðrik Bláhamar frá Super Dekk*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Dekksølan, Super Dekk, fekk í síðstu viku ein nýggjan VW Transporter, ið ætlanin er at brúka til at koyra við vørum hjá fyritøkuni og til lættari tænastuuppgávur. Bilurin er ein Transporter vørubilur við 2.5 litur TDI turbodiesel motori og 102 hk. Transportarin er dekoreraður í samráð við Goodyear Danmark. Hann hevur 17" alufelgur við dekkstøddini 235/45-17 og sjálvandi eisini við nýggjastu Goodyear F-1 dekkunum. Bilurin hevur dragihurðar á báðum síðum og er lakkeraður í originala Goodyear litinum.

1. juli fær Super Dekk vitjan av tveimum Goodyear sølustjórum, Kenneth Saust og Flemming Christensen, ið báðir hava stóran áhuga í Ellisakførum og hava gamlar bilar sum sítt frítíðarítriv.



Búskapur og vinna:

## Bíligari at flúgva

Stóra bretska flogfelagið British Airways hevur nú gjørt av at taka upp kappingina við tey sonevndu bíligu feløgini so sum Easyjet og Ryanair, sum næstan javnan flúgva við fullsettum flogførum. Harafturímóti hevur tað gingið illa fíggjarliga hjá British Airways, síðani altjóða flogferðslan fekk ein frammaná eftir atsóknirnar í USA tann 11. september í fjør.

British Airways hevur tí boðað frá, at á fleiri rutum millum evropeiskar býir verður tann vanligi ferðaseðlaprísurin lækkaður heili 80 prosent. Tað ber m. a. í sær, at frá 20. juni kostar ein einvegis ferðaseðil úr Bretlandi til Amsterdam ella París at kosta 800 krónur.

## Stórt blað illa fyri

Dagens Nyheter, sum er næststørsta morgunblaðið í Svøríki og flaggskipið hjá kenda útgávuforlagnum Bonnier, er so illa fyri fíggjarliga, at leiðslan nú hevur fingið boð um at spara heilar 166 milliónir svenskar krónur. Tað ber í sær, at 55 fólk skulu sigast úr starvi. 40 teirra arbeiða á tíðindadeildini hjá blaðnum.

## Danir missa nógv

Ein ætlan hjá ES at endurskoða landbúnaðarstuðulin fer at kosta danska landbúnaðinum meiri enn eina milliard krónur í mistum stuðuli, og tað er væl meiri, enn danir høvdu væntað.

Sjálvt endurskoðanaruppskotið verður ikki almannakunngjørt fyrr enn tann 10. juli, men longu nú er greitt, at tað fer at kosta donsku bøndrunum 1,15 milliard krónur. Danska landbúnaðarfelagið ætlar sær at fáa uppskotið broytt, tí verður uppskotið samtykt, ber ikki til at koma aftur umaftur.

UTTAN ÚR HEIMI

# Ísraelski herurin aftur á Vestara Áarbakka



*Tey 20, sum doyðu í bumbuspreingingini í Jerusalem týsmorgunin, fóru til gravar í gjár. Her leggja ein kvinna og dóttir hennara hondina á líkið av einari dóttir og systir, sum doyðu í atsókníni. Shiri Nagari var 22 ára gomul*

*Mynd: Reuters*

**Ísraelskir stríðsvognar fóru gjáranáttina inn í býirnar Nablus og Jenin, og hesaferð verða teir verandi**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Minni enn eitt samdøgur eftir ta ógvusligu bumbuspreingingina í Jerusalem týsmorgunin sendi ísraelski herurin hermenn og stríðsvognar inn í teir báðar palestinsku býirnar Nablus og Jenin á Vestara Áarbakka.

Ísraelska stjórnin samtykti týskvøldið at lata herin herseta palestinskar býir á Vestara Áarbakka. Samstundis varð avgjørt at lata hermenninar verða verandi í býunum, til palestinar gevast við sjálvmorðsbumbuatsóknunum í Ísrael. Palestinskir talsmenn søgdu eisini í gjár, at teir ísraelsku hermenninir, sum komu til Jenin, høvdu húsvognar við sær.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, lovaði beint eftir bumbuspreingingina týsmorgunin, at stjórn hansara fer at berja yvirgangin niður, og at stjórnin er til reiðar at taka øll neyðug stig.

Palestinsku myndugleikarnir hava mótmælt, at ísraelska stjórnin gevur teimum ábyrgdina av atsókníni í Jerusalem. Tann víðgongdi felagsskapurin Hamas hevur átikið sær ábyrgdina av spreingingini. Ein palestinskur ráðharri segði týskvøldið, at atsóknir sum hendan gagna ikki palestinska fólkinum, men geva harafturímóti ísraelsku stjórnini høvi til at halda fram við hersetingarpolitikkinum.

Sjálvmorðsbumbuatsóknin týsmorgunin kravdi 20 mannalív og er tann ógvusligasta seinastu seks árini.

# Seinastu leivdirnar av Kursk tiknar upp

**Russiski herflotin hevur nú bjargað teimum seinastu leivdunum av kavbátinum Kursk**

KURSK-VANLUKKAN
*Árni Joensen*

Ovastin fyri russiska norðurflotanum, Gennadij Sutsjkov, segði í gjár, at herflotin hevur nú bjargað teimum seinastu leivdunum av kjarnorkukavbátinum Kursk, sum sakk í Barentshavinum í august í 2000. Allir teir 118 menninir, sum vóru við kavbátinum doyðu.

Tað mesta av kavbátinum varð fingið upp av botni í fjør. Gennadij Sutsjkov, segði, at alt, sum hevur týdning í sambandi við vanlukkuna, er tikið upp og til lands. Hildið verður, at ein torpedo gekk av, og at Kursk tí fór til botns. Tí eru fleiri torpedorør send til Sankta Pætursborgar til nærri kanningar, segði admiralurin.

Tað, sum liggur eftir á botni, verður liggjandi, men russiski herflotin fer at tryggja, at tað verður ikki til ampa fyri teir, sum fiska á hesum leiðum.

Beint eftir vanlukkuna vildu russar vera við, at Kursk hevði stoytt saman við ein NATO-kavbát, men seinni varð sagt, at tað helst var ein torpedo, sum gekk av. Tann endaliga frágreiðingin um vanlukkuna er ikki almannakunngjørd enn.

Úr Norðurlondum:

## Vandameiri ísbjarnir

Granskarar í Noregi bera ótta fyri fleiri samanstoytum millum fólk og ísbjarnir á Svalbard í komandi árum.

Granskararnir siga, at tann veksandi hitin á Jørðini fer at hava við sær, at minni ísur verður við Svalbard um summarið, og tað fer at gera, at ísbjarnirnar fara at leita sær upp á land. Um summarið koma rættiliga nógv ferðafólk til Svalbard, og tí stúra granskararnir fyri, at vit í komandi árum fara at hoyra fleiri frásagnir um, at ísbjarnir hava gjørt seg inn á fólk.

## Illveður í Danmark

Týsdagurin var tann heitasti dagurin í Danmark í ár við umleið 33 hitastigum, har tað var heitast. Men góðveðrið fekk ein bráðan enda seinnapartin, tá ein kuldabrúgv uttan úr Norðsjónum kom við bæði gloprarregni, heglingi og sonevndum skýpumpum. Illveðrið rakti serliga Norður- og Miðjylland. Í Aalborg og aðrastaðni stóðu nógvir kjallarar undir í vatni, men ringast var í Karup og Ilskov, har tvær skýpumpur gjørdu um seg. Skýpumpurnar vóru so ógvusligar, at fleiri hús mistu takið omanav og nógv trø duttu. Í summum húsum vórðu rútarnir sognir út úr vindeygunum.

## Tey flestu sleppa

Ein uppgerð hjá norsku myndugleikunum vísir, at nógv tey flestu brotsverkini, sum verða fráboðað, enda uttan rættarviðgerð ella dóm.

Tá talan er um rán og stuldur, verður bara eitt av tíggju málum uppklárað, er talan um kynsligan ágang, verða tvey av hvørjum tíggju málum uppklárað, og tá tað snýr seg um harðskap, endar triðja hvørt mál í rættinum við dómi.

Uppgerðin vísir, at myndugleikarnir eru raskastir at loysa mál, sum snúgva seg um rúsevni. Har verða meiri enn seks av hvørjum tíggju uppklárað.